**SERSTØK BYGGISAMTYKT VIÐ VILLINGADALSVEGIN**
SB_Tórshavn_Villingadalsvegur_2025_2025

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta fylgiskjali 1, og fevnir um matr. nr. 1357b, 1356, 1355, 1354a og 1354b, Tórshavn og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir ella samanlagdir nevndu ogn.

Stk. 2. Økið verður býtt sundur í økini A, B og C samsvarandi fylgiskjali 2.

## §2. ENDAMÁL OG HEIMILD

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtyktini er at skipa høga og fjølbroytta bústaðar- og miðstaðarbygging, og at tryggja útsýni og skynsama lendisnýtslu.

Stk. 2. Økið liggur í umráðisparti A2 og A3, sum sambært almennu byggisamtyktini er ætlað ávikavist húsum í fleiri hæddum og blandaða bústaðar- og miðstaðarbygging.

Stk. 3. Fyri viðurskifti, sum ikki eru reguleraði í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3 NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1. Økið skal nýtast til blandaða bústaðar- miðstaðarbygging, umframt hóskandi fríøki og felags hentleikar til íbúgvar.

Stk. 2. Byggivaldið kann geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum.

## §4. BYGGING OG STØDD HÚSANNA

Stk 1. Øki A

1. Mest loyvda byggistig er 0,3.
2. Mest loyvda nýtslustig er 0,7.
3. Hús skulu ikki verða bygd við meira enn tveimum hæddum, umframt nýttum lofti.
4. Hús við vanligari mønureising skulu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna.

Stk 2. Øki B

1. Mest loyvda byggistig er 0,25.
2. Mest loyvda nýtslustig er 0,8.
3. Hús skulu ikki verða bygd við meira enn fýra hæddum, umframt nýttum lofti.
4. Hús við vanligari mønureising skulu ikki vera hægri enn 12 m til hægsta punkt við útvegg og 15 m til mønuna.

Stk 3. Øki C

1. Mest loyvda byggistig er 0,25.
2. Mest loyvda nýtslustig er 0,8.
3. Hús skulu ikki verða bygd við meira enn fimm hæddum, umframt nýttum lofti.
4. Hús við vanligari mønureising skulu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m til mønuna.

Stk 4. Serlig lendiseyðkenni, so sum klettar og stórir steinar, eiga í mest møguligan mun at varðveitast.

**§5. VEGIR OG PARKERING**

Stk. 1. Vegir skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Stk. 2. Atkoma skal skipast samsvarandi fylgiskjali 3.

Stk. 3. Veitast skal í minsta lagið 1 parkeringspláss til hvønn bústað.

**§6. ÚTSJÓND**

Stk. 1. Framsíður skulu sniðgevast við forskotnum veggjum og innvikum. Ein veggur má ikki vera longri enn 25 m.

Stk. 2. Framsíður skulu gerast við íblástri frá fylgiskjali 4, sum lýsir ætlaða útsjónd.

Stk. 3. Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við býararkitektin.

Stk. 4. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

**§7. BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR**

Stk. 1. Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

**§8. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR HENNI.**

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr: | 25/24966 |
| Ætlanarskriv: | |
| Góðkent: | 15-12-2025 |
| Váttað: | [signature] |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Tórshavnar Kommuna**<br>**Býarskipanardeildin** | | | | | |
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt við Villingadalsvegin | | | | |
| **Undirheiti** | Kort 1 | | | | |
| **Mát** | 1:2.500 | | | | |
| **Dagur** | 23.04.2025 | **Journal** | 25/02294 | **Teknað** | RSB |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Tórshavnar Kommuna** Býarskipanardeildin | | | | | |
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt við Villingadalsvegin | | | | |
| **Undirheiti** | Fylgiskjal 2 | | | | |
| **Dagur** | 19.06.2025 | **Journal** | 25/02294 | **Teknað** | RSB |




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt við Villingadalsvegin | | | | |
| **Undirheiti** | Fylgiskjal 3 | | | | |
| **Dagur** | 19.06.2025 | **Journal** | 25/02294 | **Teknað** | RSB |











## Tórshavnar Kommuna

**Býarskipanardeildin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt við Villingadalsvegin | | |
| **Undirheiti** | Fylgiskjal 4 | | |
| **Dagur** | 01.07.2025 | **Journal** | 25/02294 |